# Prius og XC90 í Kringvarpinum

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Toyota Prius Hybrid og Volvo XC90 – annar ein umhvørvisvinarligur hybridbilur og hin ein luksus SUV við allari útgerð**

BILAR

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 17. oktober vóru umhvørvisvinarligi hybridbilurin Toyota Prius Hybrid, ið verður drivin av tveimum motorum, og ein Volvo XC90 við V8 motori og 315 hk.

Toyota Prius er ein hybrid bilur. Orðið "hybrid" er av grikskum uppruna og merkir "blanding av tveimum nærskyldum sløgum ella rasum". Prius er ein bilur við tveimum samanbygdum motorum, einum 4 syl. bensinmotori við 78 hk og einum el-motori.

Hybridkonseptið virkar soleiðis, at bensinmotorurin og el-motorurin supplera hvønn annan og syrgja fyri, at bilurin altíð koyrir optimalt, bæði hvat kraft, økonomi og umhvørvisvernd viðvíkur.

Prius stendur til at koyra 23,3 km/l, sum er sera gott fyri ein slíkan bil. Tilsamans hevur Prius 113 hk. Toyota Prius II varð valdur "ársins bilur í Evropa 2005", og síðan hevur hann fingið óteljandi virðislønir kring allan heim.

Toyota Prius Hybrid kann síggjast og roynast hjá Reyni Service, og bíligasta útgávan kostar 328.600 kr.

## Volvo XC90

Volvo bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein XC90 við 4.4 litra V8 motori og 315 hk. Talan var um sama bil, sum amerikanski forsetin Bill Clinton varð koyrdur í, tá hann vitjaði í Føroyum.

Hesin er ein sera væl útgjørdur 7-persónabilur við t.d. lamineraðum síðurútum, leðurkabinu, ljóðanlegg við 12 hátalarum, xenon lyktum, aircondition aftan og framman. Automatgir er standard í hesari útgávuni. Við allari útgerðini kostar hesin bilurin umleið eina millión.



*Volvo XC90 við 4.4 litra V8 motori og 315 hk. Bilurin sum amerikanski forsetin Bill Clinton varð koyrdur í, tá hann vitjaði í Føroyum*



*Toyota Prius Hybrid er ein umhvørvisvinarligur bilur, sum verður drivin av tveimum motorum, einum bensin- og einum elmotori við tilsamans 113 hk*

Umframt hendan 4,4 litra V8 við 315 hk, fæst XC90 eisini við einum 3,2 litra 6 syl. bensinmotori við 238 hk og einum 2,4 litra 5 syl. dieselmotori við 185 hk.

Volvo XC90 kann síggjast og roynast hjá VR Bilum við Hoyvíksvegin, og bíligasta útgávan kostar 592.000 sum persónbilur við fimm sitiplássum.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælararar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, Sofus Hansen, bilbyggjari, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

**mg**




Tú kanst gera mun

Set ein hálvan dag av til at hjálpa Javna

Leygardagin 27. oktober ætla vit okkum í flest øll hús í landinum at selja Javnaálmanakkan. Tí heita vit á teg um at tekna teg sum seljara.

Nýt tímarnar frá kl. 10.00 til 14.00 leygardagin 27. oktober saman við okkum og frem eina góða søk. Vit ætla at gera hetta til ein hugnaligan og stuttligan dag í felagsskapi.

Hevur tú hug at gera mun? Ring tlf. 31 48 27 tann 17., 18. ella 19. okt. millum kl. 10.00-14.00 ella send teldubræv fyri 22. okt. til javni@javni.fo. Minst til at upplýsa navn, bústað og (far)tlf.nr.

REPROZ

Javni – Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo · javni@javni.fo